**VIÐMERKING**

# Skal hon etast ella skal hon liva?

**Jákup Danielsen**



Í valstríðinum, undir samgongusamráðingunum og nú samgonga er skipað, hevur maður og kvinna tosað um skattalætta og ikki minst fjølmiðlarnir halda seg hava okkurt bein at gnaga, men sambært Høgna Hoydal, er bara talan um tunna súpan við bollum í.

Striltið hevur gingið við at fáa orkestrið at halda sama tónalag. Orkesturleiðarin roynir at fáa ljóðførini stemmað, og krímið fánar burtur við teimum nógvu vitaminunum.

Hin fjórða statsmaktin følir seg traðkaða yvir tærnar. Ongin annar sær objektivitetin í teirra annars góða arbeiði, har tað er lesarin, hoyrarin og síggjarin sum taka støðu til dagsins mál. Fakfeløg halda eisini, at nú er spælið spilt mótvegis ætlanunum at gera onkra góða avtalu við arbeiðsgevaran við tí endamáli, at tað verður landskassin ella kommunukassin sum eigur at gjalda komandi sáttmálasamráðing.

Soleiðis vevja vit alt í ein ellibita og fólk, líkamikið hvørjum parti tey halda við, verða ørkymlað. Formaðurin í Búskaparráðnum tykist at halda høvdi kalt og biður menn og konur um at halda sær og hugsa. Biðjur enntá onkran óvildugan um at hugsa ella geva ráð til valdu politikarnar.

Havi fyrr víst á, at skattur er tað, tað almenna krevur inn fyri at reka samfelagið fyri, og lønarsamráðingar er tað, sum borgarin selur sína arbeiðskraft fyri. Tey sum tjena nógv, rinda mest í krónum og prosentum og tey, sum tjena minst, rinda minni í krónum og prosentum.

Nøkur eru tey sum halda, at tey rinda ov nógv til landshúsarhaldið, men onnur viðurkenna og hava ta hugsan, at við at gjalda til ein felags kassa, so eru vit við til at fáa munagóðar tænastur frá tí almenna, bæði til teirra sum ikki hava møguleika at gjalda sjálvi, hava tørv fyri tí og annars til onnur samfelagsgagnlig áhugamál

Og sjálvandi skulu øll rinda skatt...

Vit menniskju hava tíverri tann óvana, sjálvskaptur ella ikki, at vit hugsa fyrst og fremst um okkara egna bjølg. Hvat kunnu vit fáa burturúr hesum og hasum. Tað sum loypir av skal heldur ikki gevast til onnur. Tað skal setast inn á bankabók, koyrast í boksina, til tað ikki er etandi ella leggjast upp á ovasta loft.

Nýggja løgtingið og landsstýrið hevur nú havt nakrar fáar arbeiðsdagar. Tey hava sett sær fyri at umsita hetta samfelagið næstu fýra árini til gagns fyri borgaran, bæði til teirra sum onki tjena, til teirra sum tjena upptil 170 tús. kr. og til teirra sum tjena oman fyri 170 tús kr. Tað hevur ikki so stóran týdning, um súpanin er tunn, bara bollarnir kunnu metta fólkið.

Lat okkum gevast við at fokusera uppá viðurskifti, sum kunnu skapa politiska og samfelagsligan óstabilitet. Lat pressuna arbeiða objektivt, og lat okkum borgarar sjálvar taka støðu til samfelagsligu viðurskiftini og hvørja lagnu tey eiga at fáa.

Vit hava valt eitt løgting, har 32 borgarar eru settir til at taka avgerðir okkara vegna. Partur av hesum løgtingi hevur, sum siðvenja og regla er, valt løgmann og landsstýri sína vegna at standa fyri tí dagliga rakstrinum. Arbeiðsdagarnir eru enn fáir og tí er nakað tíðliga at krevja at eitt heilt fýra ára skeið skal eftirmetast longu nú.

Hvørja lagnu ein komandi fíggjarlóg fær, og hvussu nógvir pengar skulu brúkast at reka samfelagið fyri, og hvussu tað fer at hildnast at krevja skatt og aðrar inntøkur inn, mugu vit bíða eftir til tann tíð kemur. Hvør steinur í slíkari viðgerð verður endavendur, og hvør maðkapirra verður vigað. Tá verður spurningur settur, skal hon etast ella skal hon liva?

# Fyrilestur um Óðalsmentan

**FYRILESTUR**
*Kunningarstovan í Runavík*



Kommunurnar í Oyndarfirði, á Skála og í Runavík skipa í hesi vikuni fyri fyrilestrum um óðalsmentan.

Kári á Rógvi, formaður í Føroya Óðalsfelag, fer at greiða frá, hvønn týdning óðalsmentanin hevur fyri búseting og trivna í Føroyum.

Óðalsfelagið hevur roynt at ávirka jarðarpolitikkin í Føroyum. Serliga hevur felagið víst á:
matrikullógina
smá festi
leigutraðir
og jørð nærhendis stórplássum

At fáast við seyð og hava jørð í felag er at kalla elsta mentan í Føroyum. Longu í Seyðabrævinum frá 1298 stendur: »Nú eiga mangir menn seyð saman í einum haga.« Enn eru tað fleiri túsund fólk, ið hava hug at fáast við seyð, um tað er í haga ella á trøð, men henda upprunamentan kappast við so mangt annað á okkara døgum.

Fyrilestrarnir eru ókeypis og ætlaðir øllum, sum hava áhuga fyri – ella fortreð av – jarðarbrúki. Teir vera hildnir hesar dagar:

Mikukvøldið 11. februar: í Oyndarfirði kl. 18.00 og í Runavík kl. 21.00.

Hóskvøldið 12. februar: á Skála kl. 19.00.

# Steypadansur í Sørvági

**STUÐULSDANSUR**
*Tíðindaskriv*

Komandi leygardag spæla tvey vágalið steypafinalu á Hálsi í Havn. Kl. 14.00 spæla Dráttur og TB og kl. 16.00 SÍ og ÍF. Bussar fara úr Sørvági og Miðvági kl. 13.00 til dystirnar. Tilmelding á tlf. 333009 í Miðvági ella 226168 og 333248 í Sørvági.

Í samband við steypavikuskifti skipa SÍ-stuðlar fyri dansi í Sørvágs Bio. Til dansin spæla Villmenn. Villmenn hava verið í studio og gongst eftir ætlan liggur nýggja fløgan í sølubúðunum um páskirnar. Tónleikurin á fløguni er í kenda Holgar stílinum, blandaður frá contry til harðari rock.

Fløgan er upptikin og verður framleidd í BG-studio v/Bjarna Góðadal. BG studio er nýtt studio við heimstaði í Sørvági. Hetta er fyrsta fløguútgávan frá BG-studio. Onnur fløgan á skránni er ein felagsútgáva við tónleikarum úr Sørvági. Gongst eftir ætlan kemur hendan fløgan út á Vestanstevnu.

Til dansin leygarkvøldið fara Villmenn at spæla léttari dansitónleik og løg frá nýggju fløguni.

# P dagur

**Tíðindaskriv**

P dagurin, ella dagurin tá Páskabryggið kemur á marknaðin verður í ár tann 27. februar í Danmark og somuleiðis í Føroyum, har bæði Føroya Bjór og Restorff presentera teirra bryggj.

Restorffs fer at markera dagin við at seinnapartin 27. februar kl. 16.00 fer hestavognurin hjá Restorff á fyrsta sinni frá bryggjaríinum við Páskabrygginum niðan á Vertshúsið, har almenningurin fær ókeypis smakkroyndir. Partar av Havnar Hornorkesturi fara at ganga undan heystavognínum og spæla hin kenda Easter Parade hjá I Berlin og Roll out the Barrel.

Restorff ætlar at hestavognurin og skrúðgonga við hornblásturi verður ein føst Havnarmynd á hvørjum ári tá Páskabryggið og Jólabryggið kemur á marknaðin.

Restorff fer eisini at hava P dag á sølustøðunum kring landið 27. februar.




ítróttur
Nr. 28 • mikudagur • 11. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Komandi dystir

**Hondbóltur** – *1. deild kvinnur*

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 10.02 | 18.45 | Kyndil-Stjørnan | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |
| 11.02 | 19.00 | StÍF-Neistin | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 11.02 | 19.00 | VÍF-Søljan | Kristian Joensen & Karsten Joensen |

**Flogbóltur** – *Meistaradeild kvinnur*

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 11.02 | 19.45 | KÍF-Fleyr | ÍF |

# Fer spentur til verka

**Tað kom óvart á Frithleif Olsen, at hann skuldi koma somikið lætt í formanssessin, men kortini dylir hann ikki fyri, at hann er fegin um, at talan ikki gjørdist um stríðsval**

FSF-FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*– Eg ætli mær at leggja stóran dent á samskiftið við feløgini. Tað má vera tað týdningarmesta, soleiðis at talan verður um eina sterka felagseind, sigur komandi FSF-formaðurin*

Tað verður Frithleif Olsen úr Rituvík, sum verður nýggjur formaður í Fótbóltssambandinum. Hetta stóð greitt týsmorgunin, tá virkandi formaðurin, Dánjal Andreasen, boðaði frá, at hann tekur seg aftur sum formansevni.

### Ikki partur av stríði

Eftir at tíðindaskrivið varð sent út, fingu vit orðið á Frithleif Olsen, og meira enn nakað, so tóktist hann heldur bilsin, nú hann kann fara at seta seg til rættis í formansstólinum.

– Ja, tað skilji eg á lagnum, at eg nú verði formaður, og tað er so avgjørt nakað, sum eg gleði meg til. Nú gekk hetta so óalmindeliga skjótt og smertufrítt, men yvir høvur má eg siga, at tað eisini er nakað, sum gleðir meg, sigur maðurin, sum ikki visti nøkrum, tá hann fyri lítlari viku síðani varð spurdur, um hann hevði hug at stilla upp til formansvalið.

– Eg hevði so yvir høvur ikki gjørt mær nakrar tankar tann vegin, tá eg varð uppringdur av nøkrum feløgum. Hví ella hvussu tey høvdu funnið fram til júst meg, veit eg ikki, men tey søgdu seg vilja royna at fáa ein mann, sum tey kundu savna uppbakning um, og eftir at hava umhugsað støðuna, so tók eg av.

– Hinvegin havi eg roynt at hildið ein lágan profil, nú valstríðið hevur koyrt. Mær dámar sum so ikki at leggja meg út í nakað stríð, og fatanin hjá mær hevur eisini verið, at var talan ikki um ein breiðan uppbakning, so var tað kanska lítið fremjandi fyri eitt framtíðar samstarv, um stríðið um sessin skuldi gerast alt ov hart. Eg havi tó alla tíðina verið kunnaður frá teimum, sum hava roynt at rikið, men fram til í morgun visti eg so ikki við vissu, hvønn vegin tað bar.

### Betra samskiftið

Nú er slóðin tó ruddað, og komandi formaðurin dylir ikki fyri, at hann er spentur at fara í holt við nýggju avbjóðingina, tó at hann enn ikki er so nógv fyri at siga, hvørjum lutum hann serliga fer at virka fyri.

– Fyrst og fremst, so má eg sjálvandi seta væl inn í tingini, áðrenn eg fari at úttala meg heilt konkret um nakað. Men eg kann so í øllum førum siga, at eg ætli mær at leggja stóran dent á samskiftið við feløgini. Tað má vera tað týdningarmesta, soleiðis at talan verður um eina sterka felagseind. Tað síggi eg í øllum førum sum ein avgerandi fortreyt fyri menningini hjá FSF.

Um fortreytirnar hjá sær fyri at gerast formaður, sigur Frithleif, at hann í hvussu so er átti at hava ognað sær nakrar eginleikar, sum kunnu nýtast í sessinum. Í 1986 var hann við til at stovna fyritøkuna FJM, har tað í dag starvast á leið 40 fólk, og eisini hevur hann í átta ár verið partur av býráðnum í Runavík. Hartil hevur hann øll árini fylgt væl við gongdini hjá NSÍ, har hann eisini hevur verið partur av fótbóltsnevndini.

– Hetta eigur so at hava givið mær nakrar royndir. Bæði sum leiðari og sum partur av eini nevnd, og tað burdi væl saktans kunna komið mær til góðar. Men sum sagt, so fái eg tó ikki úttala meg neyvt um einstakar smálutir, fyrr enn eg havi havt stundir at seta meg væl og virðiliga inn í tingini.

Fyrsta høvi til hetta verður aðalfundinum leygardagin, og eftir boðini týsdagin ivast Frithleif ikki í, at hann fer á fundin.

– Nú noyðist eg so undir øllum umstøðum at fara. Annars havi eg ivast eitt sindur, tí eg havi ikki vilja lagt meg út í nakað stríð, men nú er tann ivin helst burturbeindur, sigur altso Frithleif Olsen at enda. Maðurin, sum komandi tvey árini fer at standa á odda fyri føroyskum fótbólti.

# Tríggir favorittar

**Trý av teimum fýra oddaliðunum takast í miðvikuni við liðini, sum eru stødd nær botninum á talvuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at steypafinalurnar vórðu avgreiddar um vikuskiftið, verður nú vent aftur til landskappingina, og longu týskvøldið skuldu steypavinnararnir úr Stjørnuni í eldin.

Hetta skuldi vera eftir evstamark okkara, tá tær vitjaðu hjá Kyndli, og lítið er at ivast í, at Stjørnan her hevur lagt seg eftir tveimum stigum.

Tað munnu ávíkavist VÍF og Neistin, sum eru á tríjða og fjórða plássinum á talvuni eisini gera, tá tær mikukvøldið skulu royna seg. VÍF fær tá vitjan av Søljuni, og hóast vágagenturnar hava tikið seg nógv fram í ár, so man VÍF tó gerast ein ov stórur gloypibiti hjá teimum.

Á Skála vitjar Neistin, og heldur ikki her kann roknast við, at stórvegis ivi verður um úrslitið. Neistin fer kanska ikki at røkka heilt inn í heiðursmerkjastríðið, men higartil hava tær tó fingið fult móti teimum trimum niðastu, og tað munnu tær helst eisini ætlað hesaferð.